# Avloysarastarv sum kokkur
## á Trygdardeplinum við Áir

**Starvið**
Matgerð, og innkeyp av matvørum og øðrum til kantinuna.
Arbeiðstíðin 3/4 tíð.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal vera kokkur, ella vera vanur við matgerð.

**Setanarviðurskifti**
Starvstíðin er 1 ár. Tann, ið settur verður, skal byrja sum skjótast.

**Lønar og setanartreytir**
verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til:
Vinnuháskúlin
Postrúm 104
Nóatún 2
FO-110 Tórshavn.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til:
Signheðin Davidsen á tel. 422354, ella Hans Johannes á Brúgv á tel. 350242.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

Postboks 104 · Nóatún 2 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo

KREA






# Goymslufólk til FJM Runavík

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi á goymslu okkara í Runavík?

Vit hava bæði mekaniskar vørur, stálvørur og aðar vørur og tilfar. Umframt hetta eru vit partur av landsins størstu goymslu av eykalutum.

Vit ynskja, at tú:

- Ert áhugaður, røkin og ágrýtin

Skrivlig umsókn við møguligum avriti av prógvum, lívsrensli o.ø. skal sendast til:

FJM Runavík
Postboks 192
FO-620 Runavík

Att.: Frithleif Olsen

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Frithleif Olsen, rakstrarleiðara á telefon 50 11 96 ella við telduposti til frithleif.olsen@faroeyard.fo.

F J M RUNAVÍK
www.faroeyard.fo

MIÐFLOKKURIN

*➤ Ungur og vaksandi*
*➤ Opin*
*➤ Familjuvinarligur*

*MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI*




# Ung fyri Miðflokkin

Ungmannafelagið hjá Miðflokkinum, vanliga stytt UfM, arbeiðir fyri at skapa áhuga hjá ungdómi fyri politikki, og fyri hugsjónini hjá Miðflokkinum.

Eftir at felagið hevði ligið nokk so stilt eina tíð, tóku fleiri ung stig til at endurreisa felagið, eftir at nógv ungt gjørdust politiskt virkin og áhugaði eftir rumblið viðv. 266b.

Tað bleiv tikið stig til at hava eykaaðalfund í januar, og síðan regluligan aðalfund í marts. Nýggj nevnd bleiv skipað. Í nevndini sita Tóri Højgaard - formaður, Rut í Grund – næstformaður, Arni Abrahamsen – skrivari, Signar á Fríðufløtum og Eva Lilaa – nevndarlimir.

Síðan hevur felagið verið virkið í almenna kjakinum, og hevur eisini skipa fyri einum cafè kvøldið, ið blev hildið í hølunum hjá Hæddini í Saltangará í septembur. Á hesum tiltaki luttóku formaðurin Tóri Højgaard, Reimund Langgaard og Jenis av Rana.

Felagið arbeiðir áhaldandi við framtíðar ætlanum, alt meðan fleiri limir leggjast til. Felagið er eisini virkið í floksarbeiðinum, og er við til at mynda politisku dagsskránna hjá flokkinum.

Um tú ert áhugað/ur í at koma í samband við UfM, ber til at seta seg í samband við Tóra Højgaard á tlf. 502049 ella á teldupost tori@kallnet.fo

## Visti tú at...

- **Stórur partur av veljarunum hjá Miðflokkinum, eru ung undir 25 ár**
- **Miðflokkurin hevur lagt fleiri ítøkilig ungdómsvinarlig uppskot fram á løgtingi**
- **Miðflokkurin hevur arbeitt miðvíst fyri at ungdómar skulu fáa ítøkiliga ávirkan á førda politikkin**

www.midflokkurin.fo